**Samandráttur av fundarsamtykt hjá Hvalbiar Kommunu tann 01. mai 2014**

Møttir: Trúgvi Gudmundarson, Rúni Thomsen, Magni Bertholdsen, Eyðfinn Debes,

Martin í Nesi, Niels J. Thomsen. Jóhan Eli Poulsen var til skips.

| | |
|---|---|
| **Mál 1:**<br><br>**Umsókn um fíggjarligan stuðul frá Kvinnu-húsinum / Kreppumiðstøðini.** | Til 1:<br><br>Samtykt varð einmælt ikki at stuðla hesum. |
| **Mál 2:**<br><br>**Skriv frá borgara um klípur til steinseting.** | Til 2:<br><br>Samtykt varð einmælt ikki at játta klípur, men grót kann latast við at hann rindar koyringina sjálvur. |
| **Mál 3:**<br>**Umrøða av samtyktu ársfundarskránni 2014.** | Til 3:<br><br>Samtykt varð at halda fast við ársfundarskránna við møguleika at flyta fund um neyðugt. |
| **Mál 4:**<br><br>**Umrøða av málinum av vali til Suðuroyar Barnaverndartænastu.** | Til 4:<br><br>Samtykt varð at halda fast við valið til Suðuroyar Barnaverndartænastu, har Trúgvi Gudmundarson er valdur sum fast umboð og Rúni Thomsen sum varaumboð. |
| **Mál 5:**<br>**Umsókn frá Royn um loyvi at nýta Grótbrotið**<br><br>**til paintball á bygdastevnuni 17. mai 2014.** | Til 5:<br><br>Samtykt varð einmælt at geva loyvi, men við<br><br>teirri viðmerking, at kommunan ikki ber nakra ábyrgd av hesum. |
| **Mál 6:**<br><br>**Kunning um hvørji mál eru beind í nevnd síðani síðsta fund.** | Til 6:<br><br>Tekniska nevnd:<br>a) Umsókn um byggiloyvi til parkeringsøki og út- |

| | |
|---|---|
| | bygging matr. nr. 25d og 92b.<br>b) Umsókn uppá jarðhita matr. nr. 95f. |
| **Mál 7:**<br>**Kunning um málsviðgerð síðani síðsta fund.** | Til 7:<br><br>Tekniska nevnd:<br>Samtykt varð at geva loyvi til jarðhitaskipan, ið Jarðfeingi hevur viðmælt. |
| **Mál 8:**<br>**Ikki alment mál.** | |